# LEIÐARI

## TIL STUÐULSFÓLKASKIPANINA FYRI BØRN OG ATKNÝTTAR STOVNAR

- Vilt tú standa á odda at skipa umsorgan og menning fyri børn, sum bera brek ?
- Hevur tú áhuga í leiðslu, starvsfólkarøkt, førleikamenning og at menna nýggjar skipanir ?
- Trívist tú í einari politiskt stýrdari organisatión, og evnar tú at laga teg til brátt skiftandi umstøður
- Megnar tú at stýra einari skipan við omanfyri 100 starvsfólkum kring landið og einari játtan omanfyri 25 milliónir?

So er tað tær, vit leita eftir at leiða Stuðulsfólkaskipanina fyri børn og atknýttar stovnar.

**Førleikakrøv**

- Viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni
- Hollan fíggjarligan førleika
- Góðan leiðsluførleika- og royndir
- Góð evni at samskifta í skrift og talu
- Evni at menna nýggjar skipanir
- Politiskt tev og gott innlit í samfelagsviðurskifti
- Kunnleika til almenna fyrisiting
- KT-førleika á høgum brúkarastigi

**Vit kunnu bjóða tær**

- Stórar avbjóðingar og áhaldandi krøv um menning av skipanini
- Royndar og framúr dugnaligar starvsfelagar við ymsum serførleikum
- Eitt sera sjálvstøðugt starv, har tú í stóran mun setir kósina
- Stóra ávirkan á menningina av tilboðum til nakrar av okkara veikastu borgarum

Ábyrgdarøkið fevnir um Stuðulsfólkaskipanina fyri børn, dagstovnin Reiðrið og Dageindina við heildartilboði fyri børn við serligum tørvi. Fyri at menna tænastuna, gagnnýta karmarnar til fulnar og menna førleika og trivna hjá starvfólkunum, verður bygnaðurin í løtuni endurskoðaður.

Tú kemur at verða í miðdeplinum at savna og samansjóða eitt starvslið, ið bæði fakliga og landafrøðiliga fevnir sera breitt.

Afturat leiðaranum eru í fyrisitingini fýra økisleiðarar, sum meta um tørv, seta fyriskipanir í verk og leiða stuðulstoymi og stuðulsstovur. Hjá børnunum eru samskiparar og stuðlar at røkja eina røð av røktar- og sernámsfrøðiligum tilboðum kring alt landið, alt samdøgrið hvønn dag í árinum.

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Petru Johnsdóttir Joensen, stjóra á Almannastovuni telefon 353510

Skrivlig umsókn saman við prógvi o.ø. skal vera Almannastovuni í hendi í seinasta lagi hósdagin 18.09.08, kl. 12.00.

Umsóknin skal sendast til:
Almannastovuna, Smyrilsvegur 20
Postsmoga 3096, 110 Tórshavn.
Viðmerkjast: Leiðari.

almannastovan

almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

KREA

# Skráin fyri Rás 2

## Mánadagur 15. sept.

15:00 Tíðindi
15:10 Føroyskur tónleikur
16:00 Tíðindi
16:10 Føroyskur tónleikur
17:00 Tíðindi
17:15 Tónleikur
18:30 Tíðindi
18:45 Tónleikur
19:00 Morgunendursending
21:00 Reflex – Kristilig sending hjá Heimamissiónini.
22:00 Føroyar mítt land
22:05 Tónleikur
23:00 Føroyar mítt land
23:05 Tónleikur
00:00 Liðugt

## Týsdagur 16. sept.

07:00 Tónleikur
08:00 Føroyar mítt land – Janus Mohr leggur til rættis.
08:05 Tónleikur
09:00 Føroyar mítt land – Janus Mohr leggur til rættis.
09:05 Morgunsending – Mirjam og Eyðfinn leggja til rættis
10:00 Lýsingar
10:05 Morgunsending (framhald)
11:00 Tíðindi
11:10 Morgunsending (framhald)
12:00 Tíðindi
12:15 Hitt-tónleikur
13:00 Ynskiløtan
14:00 Lýsingar
14:05 Ynskiløtan
15:00 Tíðindi
15:15 E-Drewið – Eyðfinn Drewsen leggur til rættis
16:00 Tíðindi
16:10 Bilradio – Magnus Gunnarson leggur til rættis
17:00 Tíðindi
17:30 Tónleikur
18:30 Tíðindi (e)
18:45 Tónleikur
21:00 Á torginum – Absalon Absalonsen tosar við Bjarna Jacobsen ættaður úr Svínoy.
22:30 Føroyar mítt land
22:35 Tónleikur
23:00 Føroyar mítt land
23:05 Tónleikur
00:00 Liðugt

## Mikudagur 17. sept.

07:00 Tónleikur
08:00 Føroyar mítt land – Heri Joensen leggur til rættis
08:05 Tónleikur
09:00 Føroyar mítt land – Heri Joensen leggur til rættis
09:05 Morgunsending – Eyðun Klakstein er vertur
10:00 Lýsingar
10:05 Morgunsending – Eyðun Klakstein er vertur
10:55 Lýsingar
11:00 Tíðindi
11:10 Morgunsending – Eyðun Klakstein er vertur
12:00 Tíðindi
12:15 Hitt-tónleikur
13:00 Ynskiløtan
15:00 Tíðindi
15:10 Seinnapartssending – Heri Simonsen er vertur
16:00 Tíðindi
16:10 Seinnapartssending – framhald
17:00 Tíðindi
17:15 Tónleikur
18:30 Tíðindi (e)
18:45 Tónleikur
19:00 Morgunendursending (e)
21:00 Úr skjáttuni
22:00 Føroyar mítt land
22:05 Tónleikur
23:00 Føroyar mítt land
23:05 Tónleikur
23:55 Liðugt




## Bilradio

### – Týsdagin kl. 16.10

Í bilprátinum verður tosað við Trónda Sigurðsson og Levi Nybo, sum báðir læra at selja bilar á hvør síni bilasølu. Í biltíðindunum hoyra vit m.a. um at komandi ár kemur ein heilt nýggjur sportligur Porsche luksus sedan við fýra hurðum á marknaðin. Tosað verður eisini við formannin í Harley-Davidson Club Føroyar, Heina Restorff, um felagskapin og um eina Harley vitjan í hesi vikuni.

RÁS ...títt radio